# Klaksvíkar Sjúkrahús

Søkt verður eftir læknaskrivara til fulltíðarstarv, at byrja 1. juli 2024, ella eftir nærri avtalu.

Førleikakrøv/persónligir eginleikar:

- útbúgving sum læknaskrivari
- kunnleiki til Cosmic
- kunnleika til tryggingar/patientklagenævnet
- góð samstarvsevni, álitsvekjandi og jaligt sinni og ágrýtni í mun til arbeiðsuppgávurnar
- ert viðvirkandi til at skapa eitt jaligt arbeiðsumhvørvi
- hevur jaligan hugburð til arbeiðið, fakliga menning og starvsfelagar
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góðan røkjuskap
- tola skiftandi arbeiðsuppgávur
- tað er ein fyrimunur um man hevur umsitið alloplastik og skaðastovu.

**Ein deild og eitt sjúkrahús**

Á deildini starvast dugnalig og ábyrgdarfull starvsfólk, sum arbeiða innan økini parenkym, urologi, ortopædi, neurologi, internmedisin, svøvnkøvu og skaðastovu.

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er ein blandað medisinsk og kirurgisk seingjardeild við 22 seingjarplássum. Tvær skurðstovur, ein ambulatoriudeild, við skurð-ambulatorium, ortopædkirurgiskum ambulatorium, urologiskum ambulatorium, medisinskum ambulatorium, svøvnkøvu ambulatorium, endoskopirúm og skaðastova. Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi arbeiða vit rehabiliterandi, tvørfakligt og tvørsektionelt.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við deildarleiðaran, Anniku Karlsdóttir Ljósstein, teldupost: akl@ks.fo, telefon 235423.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og CV, skal sendast til: umsokn@ks.fo

Umsóknarfreistin er 10.05.2024.

*Á heimasíðu okkara www.ks.fo kanst tú lesa um okkara visjón, missión og strategimál undir leinkjuni ”Sjúkrahúsið”.*

*Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Okkara uppgáva er at veita øllum dygdargóðar heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.*

*Vit eru trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir felags virðum. Í Sjúkrahúsverkinum vísa vit virðing fyri sjúklingunum, avvarðandi og starvsfólki, og miða altíð eftir at veita rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.*

*Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum. Í Sjúkrahúsverkinum starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar.*

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS
Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík
Tel.: +298 45 45 45
ks@ks.fo
ks.fo